

SOZOPREPRESS

# LANDS APOTEKARI

Starvið sum landsapotekari verður við hesum lýst leyst til setan 1. juni 2011 ella eftir nærri avtalu.

Landsapotekarin er ovasti leiðari fyri apoteksverkið og hevur mótvegis Heilsumálaráðnum endaligu ábyrgdina av virkseminum.

## Um starvið

**Uppgávurnar eru í høvuðsheitunum hesar:**
· ábyrgd fyri ráðlegging, raðfesting, ígongdseting og samskipan av arbeiðsuppgávunum í apoteksverkinum
· ábyrgd fyri støðugari menning í apoteksverkinum soleiðis at apoteksverkið á heilivágsøkinum livir upp til nútíðarkrøv.
· ábyrgd fyri gerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri stovnin.
· ábyrgd av, at góðkend fíggjarætlan verður hildin.
· ábyrgd fyri at hagtøl fyri samlaðu heilivágsnýtsluni í føroyska samfelagnum eru tøk.
· ábyrgd at røkja nærri útgreiðnaðar myndugleikauppgávur og ráðgeva Heilsumálaráðnum um heilivág í síni heild, Eftirlit við lóggávan viðvíkjandi apoteksverkinum v.m. verður hildin dagførd.
· ábyrgd av samstarvi um heilivágsviðurskifti við útlendskar stovnar og myndugleikar.

## Førleikakrøv

Landsapotekarin skal hava staðið danskt farmaseutiskt kandidatprógv ella samsvarandi prógv, sum er góðkent at lúka sáttmála við onnur lond. Harumframt verður kravt, at viðkomandi í starvi hevur víst seg skikkaðan at reka apotek.

Tann rætti umsøkjarin skal harumframt hava:
· áhuga og vitan um heilsuverkið í síni heild
· góð leiðslu- og samstarvsevni
· ein mennandi leiðslustíl
· evni at seta í verk fyriskipanir
· vitan um fíggjarstýring og heilsubúskap
· góð samskiftisevni í skrift/talu

## Lønar & setanartreytir

Setanarøkið er Apoteksverkið og Heilsumálaráðið við undirliggjandi stovnum. Viðkomandi, ið settur verður, skal kunna tola broytingar í starvinum, bæði í starvsinnihaldi og vavi.

Næsti fyrisetti er aðalstjórin í Heilsumálaráðnum. Lønin er ásett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Pharma Danmark.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til: Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á t-posti: poul.geert.hansen@hmr.fo ella tel 30 40 50.

## Umsókn

Umsókn við CV og avriti av neyðugum skjølum skal sendast til:

**Heilsumálaráðið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2, 100 Tórshavn

Umsóknarfreist:
**30. mei 2011 kl. 12.**

**Heilsumálaráðið**
Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn, tel 30 40 50,
fax 30 40 25, hmr@hmr.fo, www.hmr.fo

---

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

# Roynt skrivstovufólk til Sjóvinnustýrið

**Av tí, at ein av okkara starvsfeløgum í Sjóvinnustýrinum fer frá fyri aldur, er eitt starv sum skrivstovufólk í umsitingini leyst at søkja.**

**Starvið fevnir í høvuðsheitum um:**
- Journalisering
- Arkivering
- Telefon- og kundaavgreiðsla
- Bókhald
- Aðrar fyrifallandi skrivstovu uppgávur

**Útbúgvingar- og førleikakrøv:**
Skrivstovuútbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Harumframt krevst:**
- Hollan kunnleika til journal/arkiv
- Góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góð samstarvsevni
- Evni at arbeiða sjálvstøðugt
- Jaligan hugburð
- Góðan telduførleika
- Kunnleika til journalskipanna 360 og Doculive er ein fyrimunur

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er Sjóvinnustýrið í Miðvági.
Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Vinnumálaráðnum. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi starvsøki á stovni í støðugari menning við fjølbroyttum uppgávum at loysa bæði í Føroyum og úti í heimi.
Stovnurin leggur dent á at bjóða starvsfólkum sínum holla og støðuga eftirútbúgving við møguleikum at menna seg fakliga og persónligt.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Sjóvinnustýrinum í hendi í seinasta lagi 16. mai kl. 15.00.

Fyrispurningar um starvið kunnu setast til Vilhjálm Gregoriussen ella Christel Christoffersen.

**Umsóknir skulu sendast sum bræv ella teldubræv til:**
SJÓVINNUSTÝRIÐ, POSTSMOGA 26, FO-370 MIÐVÁGUR ELLA FMA@FMA.FO

*Sjóvinnustýrið er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum. Ábyrgdarøkið hjá stovninum hevur útgangsstøði í sjóvinnuni og rammunum fyri hesi vinnu. Hetta fevnir um sjóvinnupolitikk og lóggávu, eftirlit við bygging av føroyskum skipum og hvussu hesi eru gjørd út, áseting um manning, at tryggja arbeiðsumhvørvið umborð á skipum, umhvørvisvernd og skráseting í Føroya Skipaskrá og Føroya Altjóða Skipaskrá.*
*Høvuðsendamálið hjá Sjóvinnustýrinum er at fyribyrgja óhapp og tryggja høgt trygdarstøði fyri før undir føroyskum flaggi og manning teirra. Harumframt miðar Sjóvinnustýrið ímóti, framhaldandi at menna kappingarførið hjá FAS.*